**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI VINDMYLLUR Í PORKERI (PORKERIS HAGA).**

Serstaka byggisamtyktin er grundað á, at Umhvørvisstovan hevur givið felagi loyvi at seta vindmyllur upp í haganum Heimari Partur. Í fyrsta lagi er talan um sjey vindmyllur, men møguleiki er fyri at seta upp 5 vindmyllur afturat, so samlaða talið er 12 vindmyllur.

Vindmyllurnar eru umleið 45 m høgar við einum tilsvarandi veingjabreiði.

Vindmyllurnar eru staðsettar so mikið langt frá bygdum øki, at óljóð ikki skuldi verið til ampa fyri nærmastu grannar. Frástøðan til nærmasta A bústaðarøki í almennu byggisamtyktini fyri Porkeris kommunu er uml. 900 m.

Loyvishavarin skal søkja um byggiloyvi umframt at gera eina umhvørvisárinsmeting, sum skal góðkennast av Umhvørvisstovuni. Umhvørvisárinsmetingin viðger t.d. trygdarviðurskifti, dálking, ávirkan á landslag, ávirkan á plantu- og djóralív v.m. Eisini skal ein umhvørvisgóðkenning fáast frá Umhvørvisstovuni og loyvi frá øðrum avvarðandi myndugleikum, áðrenn byggiloyvi verður útskrivað.

**§ 1. ENDAMÁL**

1.1 at skipa økið, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, til uppsetan av vindmyllum.

1.2 at tryggja, at staðsetingin av vindmyllunum verður uppsett eftir eini ávísari skipan.

1.3 at tryggja, at vindmyllurnar, sum verða uppsettar eru eins á at líta í stødd, sniði og skapi.

1.4 at avmarka ampan av vindmyllunum.

1.5 at skipa tænastuøkir, tilkoyring til økið og vegir inni á økinum.

1.6 at tryggja, at ein umhvørvisgóðkenning frá Umhvørvisstovuni fyriliggur.

**§ 2. HEIMILD OG AVMARKING**

2.1 Serstaka byggisamtyktin er heimilað í §4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir og grein 5 í "Býarskipan og byggisamtykt fyri Porkeris kommunu".

2.2 Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali nr. 1 og er partur av matr. nr 242 og 243a í Porkeri.

2.3 Økið kemur undir 4.12 í "Býarskipan og byggisamtykt fyri Porkeris kommunu", sum er øki til landbúnað. Tað er eisini ásett, at umframt byggiloyvi, krevst eisini góðkenning frá friðingarnevndini.

## § 3. NÝTSLA ØKISINS

3.1 Á økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, kunnu 12 vindmyllur setast upp við hartil hoyrandi tænastuøki og koyrivegi .

## § 4. BYGGING, STØDD OG STAÐSETING

4.2 Mest loyvda hædd 50 m.

4.3 Endalig staðseting, harundir innanhýsis fjarstøður og vegaføring skal góðkennast av Porkeris kommunu.

.

## § 5. VEGIR

5.1 Koyrivegir á økinum skulu asfalterast og leggjast í minst 4 m breidd.

5.3 Um annað virksemi verður í økinum ella vindmylluøkið verður víðkað, skal loyvi gevast til nýtslu av vegunum til slíkt virksemi. Kommunan kann krevja at økið verður stongt av.

5.4 Samlingarøkini skulu takast burtur, tá ið vindmyllurnar eru settar upp.

## § 6. UMHVØRVISKRØV

6.1 Byggiloyvi er treytað av góðkenning av umhvørvisárinskanning.

6.2 Byggiloyvi er treytað av umhvørvisgó ðkenning.

6.3 Trygging skal veitast ímóti dálking í sambandi við bygging og í sambandi við dagliga virksemið.

## § 7. BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

7.1 Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Porkeris kommunu einsamøllum.

## § 8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

8.1 Smávegis léttar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámurin á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

8.2 Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt bygdaráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.